# ítróttur

Nr. 229 • týsdagur • 29. november 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# U-21 liðið kemur helst í 2007

**Enn er endaliga avgerðin ikki tikin. Men formaðurin í landsliðsnevndini hjá Fótbóltssambandinum sigur, at Føroyar væntandi hava eitt U-21 landslið, tá OL-undankappingin byrjar í 2007**

U-21 LANDSLIÐ
*Jákup Mørk*

- Skal menningin av føroyskum fótbólti halda fram, so er mest sum alneyðugt við einum U-21 landsliði.

Somikið avgjørdur var Jógvan Martin Olsen, tá hann tók við sum føroyskur landsliðsvenjari. Tá staðfesti Óli Holm, formaður í FSF, at hetta var eitt mál, sum arbeitt verður við. Og nú er eisini líkt til, at ynskið hjá landsliðsvenjaranum verður veruleiki.

- Enn er formliga avgerðin ikki tikin, so eg fái ikki svarað við vissu, sigur Jens Erik Magnussen, formaður í landsliðsnevndini hjá FSF.

- Tað er tó greitt, at vit ikki vera við í pottinum, tá lutur verður kastaður um komandi U-21 kappingina í januar mánaði. Til tess er skotbráðið ov stutt.

- Hinvegin, so er talan hesa ferð um eitt slag av millumspæli, nú U-21 kappingarnar verða umskipaðar, og tí er tað ikki altavgerandi at vera við hesaferð. Ætlanin hjá okkum er tó, at vit skulu vera við, tá trekt verður um bólkarnar til undankappingina til OL í 2008. Tann undankappingin byrjar í 2007.

### Kostar yvir milliónina

Í mun til verandi kappingarskipan, so verður tað í framtíðini ikki so, at A- og U-21 landsliðini eru í eins bólkum. Tað vil við øðrum orðum siga, at kostnaðurin av einum U-21 landsliði verður størri í framtíðini, enn hann hevur verið. Og fyrst og fremst er tað fíggjarligi spurningurin, sum FSF vil greiða, áðrenn endaliga avgerðin verður staðfest.

-Tað eru jú ikki smápengar, sum tað snýr seg um. Fyri luttøkuna fáa vit einar 200.000 sveisarafrankar, sum svara til nærum milliónina, men tað er tó langt ífra nóg mikið til at rinda kostnaðirnar, sigur Jens Erik.

Hvussu stórir eru so samlaðu kostnaðirnir?

- Tað vita vit sjálvandi ikki. Tað veldst jú um, hvørt vit enda í bólki við Danmark ella Kasakhstan. Men roknast skal helst við einum tveimum milliónum. Altso skulu vit finna fígging til góða millión sjálvir.

Og tað rokna tit við at klára?

- Tað er so málið. Enn er formliga avgerðin so ikki tikin, men vit rokna við, at hetta verður avgreitt tíðliga í komandi ári, sigur Jens Erik Magnussen.



*Bergur Midjord hjá, sum í heyst fyri fyrstu ferð var partur av A-landsliðshópinum, vildi ivaleyst verið eitt gott boð upp á ein komandi U-21 landsliðsspælara. Og tað vildi Svend F. Jacobsen hjá HB helst eisini verið*

## Tromsø í hálvfinaluni

**Við teprum 3-2 sigri á útivølli móti Førde eydnaðist føroyingunum í Tromsø at vinna seg fram til norsku hálvfinalunar í flogbólti**

ÚTISETAR
*Jákup Mørk*

Fyri stuttum vann Tromsø annars hampuliga tryggan 3-1 sigur á heimavølli móti Førde, men teir báðir, Bárður B. Mikkelsen og Rúni Weihe staðfesta tó, at teir eisini roknaðu við truplari uppgávu hesaferð.

Úrslitið av dystinum leygardagin varð ein 3-2 sigur til Tromsø, sum vann vit settunum 25-23, 21-25, 17-25, 25-18, 13-15.

Sagt verður í norskum miðlum, at serliga Rúni Weihe hevði stóran týdning, tá dysturin varð vendur eftir laka fyrsta settið. Síðani leikaði javnt á, og serliga seinasta settið varð ein ordans gysari. Tromsø loyvdi sær enntá at gera servufeil, tá teir áttu fyrsta dystarbóltin, men teir megnaðu kortini at koyra settið heim, tá Førde servaði.

## Magni og Siggi halda fram í B36

Ikki óvæntað hevur B36 valt at halda fram við venjaraparinum, sum í fjør førdu liðið til gull í FM-kappingini.

Sigfríður Clementsen og Magni Mohr hava báðir gjørt at taka av tilboðnum um framhald í felagnum. Í løtuni er Sigfríður sjálvur staddur uttanlands, men kropsligu venjingarnar eru longu byrjaðar, og teimum tekur Magni sær av.

**-mørk**

# Borðtennis

**Næsta umfarið í Grand-Prix kappingini í borðtennis var í Trongisvági. Kappast varð í 11 bólkum, har eini 6-8 luttakarar vóru í hvørjum bólkinum. Vinnararnir vóru hesi.**

A Petur Niclasen, Tór
B Vagnur Nolsøe, TBF
C Hallur Thorsteinsson, Tór
D Sheila Strøm, TBF
E Tróndur Tummasarson, TBF
F Guðfinn Jespersen, TBF
G Brian Vang, Tór
H Marin Brattalíð, TBF
I Bergur Mørkere, TBF
J Andrias Olsen, Tór
K Allan Petersen, Tór

**Samlaða støðan eftir 2. Grand Prix-umfarið er hendan:**

**Smápinkur:**

| Navn | Felag | Stig |
|---|---|---|
| Anna Mikkjalsdóttur | TBF | 164 |
| Eva Wilhelm | TBF | 144 |
| Lív Øster | TBF | 134 |

**Smápiltar:**

| | | |
|---|---|---|
| Hans Jón Jacobsen | TBF | 156 |
| Eyðfinnur Jensen | TBF | 138 |
| David Mortensen | TBF | 114 |



*Reidar Luid úr Tór er á odda í dreingjabólkinum*

**Pinkur:**

| | | |
|---|---|---|
| Birita Mortensen | TBF | 176 |
| Femja Mortensen | TBF | 164 |
| Súsanna Bærensen | TBF | 150 |

**Piltar:**

| | | |
|---|---|---|
| Rasmus Potts | TBF | 370 |
| Heini Mortensen | TBF | 350 |
| Patrikk Johannesen | TBF | 240 |

**Smágentur:**

| | | |
|---|---|---|
| Rakul Mikkjalsdóttur | TBF | 520 |

**Smádreingir:**

| | | |
|---|---|---|
| Gilli Sørensen, | TBF | 750 |
| Fróði Jensen, | TBF | 740 |
| Hugin Albinus, | TBF | 660 |

**Gentur:**

| | | |
|---|---|---|
| Susie Midjord | TBF | 640 |
| Joan Thomasen | TBF | 460 |
| Sheila Strøm | TBF | 300 |

**Dreingir:**

| | | |
|---|---|---|
| Reidar Luid | Tór | 920 |
| Pætur Albinus | Tór | 800 |
| Sjúrður Ferjá | TBF | 700 |
| Hallur Thorsteinsson | Tór | 700 |

**Kvinnuunglingar:**

| | | |
|---|---|---|
| Marin í Dali | TBF | 800 |
| Mariann Mikkjalsd. | TBF | 550 |
| Eydna Jespersen | TBF | 410 |

**Mansunglingar:**

| | | |
|---|---|---|
| Ragnar Egilsson | Tór | 930 |
| Sigurð Carlsson | Tór | 840 |
| Levi Winther | Tór | 490 |

**Meistaradeildin:**

| | | |
|---|---|---|
| Fríði Jensen | TBF | 920 |
| Vagnur Nolsøe | TBF | 800 |
| Petur Niclasen | TBF | 500 |

# FSF-menn á UEFA-kongress

**Ungdómsfótbólturin er á breddanum, nú FIFA hevur kongress á Cypros**

UEFA
*Jákup Mørk*

Trý umboð fyri føroyskan fótbólt eru í hesum døgum á Cypros, har UEFA hevur kongress um ungdómsfótbólt.

Óli Holm, formaður í FSF, er sjálvur limur í ungdómsnevndini hjá UEFA, sum longu mánadagin fór undir sína fundarrøð.

Týsdagin verður so fundur við umboð fyri ymsu limalondini hjá UEFA, og eisini her eru føroyingar millum luttakararnar. Fyri FSF er Niklas á Líðarenda, og sum ábyrgdarhavandi av ungdómsarbeiðinum hjá FSF hevur hann eisini Jógvan Martin Olsen afturat sær.

Á skránni fyri fundin er serliga venjing og venjaraútbúgving, tá um yngri deildirnar ræður. Eisini verður tikið saman um arbeiðið, sum er gjørt á hesum økinum seinasta árið, eins og japanesarar fara at greiða frá, hvussu teir hava valt at skipa ungdómsarbeiðið innan fótbóltin.